Nr. 2/2019

Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um bussleiðina millum Vágar og høvuðsstaðin, settur landsstýrismanninum í samferðslumálum Jørgeni Niclasen, (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Fer landsstýrismaðurin at tryggja, at ferðaætlanin hjá Bygdaleiðum verður broytt, so næmingar, sum ganga á Glasi og búgva í Vágum, smidliga sleppa til og frá skúla?

2. Fer landsstýrismaðurin somuleiðis at endurskoða ferðaætlanina millum Vágar og høvuðsstaðin við atliti at ferðing til og frá arbeiðsplássum?

Viðmerkingar:
Í mong ár hava vágafólk lættliga ferðast millum Vágar og høvuðsstaðin til undirvísing á miðnámsskúla. Men síðan miðnámsskúlarnir vórðu lagdir saman og blivu til Glasir, hevur ferðingin millum oyggjarnar verið trupul, tí ferðaætlanin ikki longur er tillagað skúlagongdina. Næmingar úr Vágum, sum ganga á Glasi, mugu ofta vera burtur størsta partin av degnum, skulu teir fylgja undirvísingini. Harafturat leggur eingin bussur leiðina fram við Gásadali ella Bø.

Eisini eru nógv, sum búgva í Vágum og arbeiða í Havn, sum somuleiðis hava trupult við at ferðast millum bústað og arbeiðsstað. Í hesum sambandi hevði verið skilagott í sama viðfangi at tillaga bussleiðina til størru arbeiðsplássini í høvuðsstaðnum so sum Glasir og Landssjúkrahúsið.

Trupulleikar við bussleiðini til og úr Vágum hava áður verið reistir á Løgtingi m.a. av Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni. Tað er mín vón, at trupulleikin verður loystur sum skjótast, tí tað vildi verið ein stórur lætti í gerandisdegi teirra, sum arbeiða ella nema sær útbúgving í høvuðsstaðnum. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 1. oktober 2019

Jóhannis Joensen